## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Skrið ella stormur av landsynningi , seinnapartin nakað minni vindur. Regn av og á og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hvassur vindur ella skrið av suðri og stundum regn. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og regn. Seinnapartin minni vindur av útsynningi og sólglottar, men okkurt ælið. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í ein strúk av útsynningi og okkurt ælið, týsdagin upp í hvassan vind av suðri og regn. Hitin millum 5 og 9 stig.

# Hesaferð var tað seyðurin ...

**Fríggjadagurin í farnu viku gjørdist ikki ein vanligur dagur í barnagarðinum á Eiði. Tað er nevniliga ikki hvønn dag, at ein sær ein druknaðan seyð flóta í hólmanum!**

BØRN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Druknaði seyðurin í hylinum í Hólmanum á Eiði. Spurningurin er, hvør hevur ábyrgdina av hesum?*

**Eiði:** Hetta var júst tað sum tey sóu. Tey hildu sjálvandi, at hetta var sera spennandi og høvdu nógvar ymiskar meiningar um, hvussu hetta man verða hent, greiðir eiðismaðurin, Jógvan í Skorini frá.

Onkur helt, at talan má vera um hálku, og at seyðurin allarhelst var gliðin. Onkur annar helt, at møguliga var seyðurin vorðin troyttur av lívinum í hesum kuldanum.

Ein smádrongur helt, at helst hevði nykurin - sum abbi hansara plagdi at tosa um - verið uppá spæl og fingið sær fatur á einum góðum kjøtbita.

### Børnini eru taparin

Tað var sjálvandi ikki einfalt hjá hesum umleið fimmti smáu "detektivunum" í barnagarðinum at loysa hetta málið.

Men eins og aðrar "krimisøgur" hevur henda eisini sína byrjan. Sambært Jógvani í Skorini – sum fyri blaðnum hevur gjørt vart við hetta málið – byrjaði hon, tá samtykt varð at fara undir at fylla hólman, við tí fyri eyga at gera fótbóltsvøll á Eiði. Myndugleikarnir telvaðu um málið, men tað stutta av tí langa er, at í dag er hólmin hvørki fótbóltsvøllur ella hólmi.

- Børnini gjørdust taparin, tí Hólmurin er ein deyðsfella, sum liggur bert fimm metrar frá barnagarðinum. Har eru stórir og djúpir hyljar, har hvørki menn ella børn grynna. Ja, einar víðopnar dyr, beint niður til sjálvan nykin, sum Jógvan bæði speirekandi og álvarsamt tekur til.

Spurningurin hjá Jógvani og mongum øðrum foreldrum á Eiði er, um nakað verður gjørt, áðrenn tað verður seyðurin, ið fer at standa og hyggja niður í bládýpið eftir einum lívleysum barni.

- Kanska er tað ikki órímiligt at enda við orðunum hjá Harriet Beecher Stowe. Hon stríddist fyri tey, ið ikki sjálvi høvdu møguleika at krevja sín rætt. Hon segði: "The bitterest tears shed over graves are for words left unsaid and deeds left undone."

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -10 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | -7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 0 |
| London | -1 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | -7 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -6 |
| Keypmannah. | -4 |
| Helsinki | -17 |
| Moskva | -7 |
| Berlin | -5 |
| Warzawa | -5 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | -4 |
| Madrid | 1 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 17 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | -7 |
| New Dehli | 10 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 25 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 9 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 965 hPa. Í útsynning úr Íslandi grynnist.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland fer norðureftir og brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 07/01 kl. 06⁰⁰ – 08/01 06⁰⁰. Hitin í gjár: -0,6°
Minsti hiti máldur í januar: -10,5° -
Mesti hiti máldur í januar: +13,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/01 kl. 06⁰⁰ – 04/01 06⁰⁰.
Avfallið higartil í januar: 10 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 1. januar: | Mánin næstur jørðini |
| 3. januar: | Jørðin næst sólini |
| 7. januar: | Seinna kvarter |
| 15. januar: | Tendring |
| 17. januar: | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2010

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 14. jan | 05:58 | 18:22 | 04:58 | 17:22 | 05:13 | 17:37 | 07:58 | 20:22 | 08:58 | 21:22 | 04:13 | 16:37 | 03:13 | 15:37 | 06:13 | 18:37 | 07:13 | 19:37 | 05:43 | 18:07 | 06:58 | 19:22 |
| 15. jan | 06:45 | 19:09 | 05:45 | 18:09 | 06:00 | 18:24 | 08:45 | 21:09 | 09:45 | 22:09 | 05:00 | 17:24 | 04:00 | 16:24 | 07:00 | 19:24 | 08:00 | 20:24 | 06:30 | 18:54 | 07:45 | 20:09 |
| 16. jan | 07:29 | 19:50 | 06:29 | 18:50 | 06:44 | 19:05 | 09:29 | 21:50 | 10:29 | 22:50 | 05:44 | 18:05 | 04:44 | 17:05 | 07:44 | 20:05 | 08:44 | 21:05 | 07:14 | 19:35 | 08:29 | 20:50 |
| 17. jan | 08:10 | 20:30 | 07:10 | 19:30 | 07:25 | 19:45 | 10:10 | 22:30 | 11:10 | 23:30 | 06:25 | 18:45 | 05:25 | 17:45 | 08:25 | 20:45 | 09:25 | 21:45 | 07:55 | 20:15 | 09:10 | 21:30 |
| 18. jan | 08:47 | 21:05 | 07:47 | 20:05 | 08:02 | 20:20 | 10:47 | 23:05 | 11:47 | - | 07:02 | 19:20 | 06:02 | 18:20 | 09:02 | 21:20 | 10:02 | 22:20 | 08:32 | 20:50 | 09:47 | 22:05 |




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo